# Fúrstin við á jomfrúferð

**Fleiri ráðharrar og ein prinsur vóru partur av dýrabæru lastini, tá nýggja Augusta Westland tyrlan hjá Atlantic Airways í gjár fleyg sín fyrsta almenna túr**

**TYRLA**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Albert II fúrsti av Monaco var í gjár við á fyrstu almennu ferðini við nýggju tyrluni hjá Atlantic Airways. Talan var ikki um nakra drúgva ferð. Bert nakrir minuttir gingu, frá tí at Augusta Westland, AW-139, tyrlan fór á flog, til hon settist aftur úti á Boðanesi í Havn. Tá hevði ferðalagið verið á sightseeing yvir høvuðsstaðnum, vestur móti Mykinesi, Tindhólmi og Vágabjørgunum, eins og Hestur og Koltur eisini kundu síggjast.

Og umborð vóru fínir gestir. Umframt stjóra og nevndarformann í Atlantic Airways, taldi ferðalagið eisini Jørgen Niclasen, Johan Dahl og Jacob Vestergaard. Og so var Albert II fúrsti av Monaco eisini við á flogi. Men júst hvørji ørindi hann hevði, bar ikki til at fáa at vita.




*Bjarni Askham Bjarnason, nevndarformaður í Atlantic Airways, Albert II fúrsti av Monaco og Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways eru her avmyndaðir eftir ferðina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av útsynninginum, seinnapartin upp í andøvsgul av suðri. Turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og seinnapartin regn. Um kvøldið minni vindur av suðri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og Ólavsøkuaftan:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

*Juni var bæði turrur í lýggjur. Avfallið var bert 17mm ímóti 66mm, sum er miðal yvir 30 ár. Miðalhitin var 9,9°c ímóti 9.0°c yvir 30 ár.*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ







**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. við Hebridurnar fer eystureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 998 hPa. norðan fyri Ísland fer suðureftir.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/07 kl. $06^{00}$ – 22/07 $06^{00}$. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 21/07 kl. $06^{00}$ – 22/07 $06^{00}$.
Avfallið higartil í juli: 32 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

21. juli — Mánin næstur jørðini
22. juli — Tendring

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. juli | 07:30 | 19:59 | 06:30 | 18:59 | 06:45 | 19:14 | 09:30 | 21:59 | 10:30 | 22:59 | 05:45 | 18:14 | 04:45 | 17:14 | 07:45 | 20:14 | 08:45 | 21:14 | 07:15 | 19:44 | 08:30 | 20:59 |
| 23. juli | 08:25 | 20:52 | 07:25 | 19:52 | 07:40 | 20:07 | 10:25 | 22:52 | 11:25 | 23:52 | 06:40 | 19:07 | 05:40 | 18:07 | 08:40 | 21:07 | 09:40 | 22:07 | 08:10 | 20:37 | 09:25 | 21:52 |
| 24. juli | 09:16 | 21:40 | 08:16 | 20:40 | 08:31 | 20:55 | 11:16 | 23:40 | - | 12:16 | 07:31 | 19:55 | 06:31 | 18:55 | 09:31 | 21:55 | 10:31 | 22:55 | 09:01 | 21:25 | 10:16 | 22:40 |
| 25. juli | 10:02 | 22:26 | 09:02 | 21:26 | 09:17 | 21:41 | - | 12:02 | 00:40 | 13:02 | 08:17 | 20:41 | 07:17 | 19:41 | 10:17 | 22:41 | 11:17 | 23:41 | 09:47 | 22:11 | 11:02 | 23:26 |
| 26. juli | 10:48 | 23:11 | 09:48 | 22:11 | 10:03 | 22:26 | 00:26 | 12:48 | 01:26 | 13:48 | 09:03 | 21:26 | 08:03 | 20:26 | 11:03 | 23:26 | - | 12:03 | 10:33 | 22:56 | 11:48 | - |

Kelda. Álmanakkin 2008




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo